## DAGSINS MEINING

# Mannarættindi og deyðarevsing

Í hesi vikuni hevur altjóða mannarættindadagurin verður hildin um allan heim. Í ár eru 53 ár liðin síðani Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um Mannarættindi sá dagsins ljós. Felagsskapurin Amnesty International, ið eisini er sera virkin her á landi, er seinni grundaður á nettupp hesa yvirlýsing, og tí var hesin dagur nakað heilt serligt fyri felagsskapin og øll tey, sum gera eitt stórt og týðandi arbeiði í Amnesty.

Amnestyfelagsskapurin hevur eisini hátíðarhildið føðingardag í ár. 40 ár eru liðin, síðani felagsskapurin fyri fyrstu ferð sá dagsins ljós. Føroyska deildin varð stovnað í 1965 og er tí ein av elstu deildunum hjá felagsskapunum og helst eisini ein av teimum mest virknu.

Nú heimurin er vorðin nógv minni og menningin hevur tikið dyk á seg nærum alla staðni skuldi ein trúð, at tað var ikki so nógv brúk fyri slíkum felagsskapi og slíkari yvirlýsing longur. Men so er tíanverri ikki. Fátækradømi, ójavni, órættvísi og brot á vanlig mannarættindi er framvegis so stórt, at tað framvegis eru boð eftir felagsskapum sum ST og Amnesty. Tað var tí heldur ikki av tilvild, at ST-felagsskapurin og tess aðalskrivari mannarættindadagin fingu handað heimsfriðarvirðisløn Nobels.

Vit eiga øll at vera góð við og stuðla slíkum felagsskapum sum ST og Amnesty, sum báðir á hvør sín hátt stríðast ímóti eitt nú brotum á mannarættindini. Ikki bert í teimum tilafturskomnu og totalitert stýrdu londunum. Eisini í okkara egna sokallaða siviliseraða vesturheimi verða dagliga framd brot á mannarættindini og mest vanvirðisliga brotið er deyðarevsingin í USA. Amnesty hevur brúkt nógva orku til at kunna um deyðarevsingina og fyri at stríðast fyri at fáa deyðarevsingina avtikna. Tað er av stórum týdningi, at vit øll stuðla Amnesty í hesum týdningarmikla stríði og at politikarar, mentafólk og onnur við eitthvørt høvi finnast at USA fyri tess brot á mannarættindini.

Júst deyðarevsingin í “God own country” átti at verið svarti bletturin í okkara samvitsku, tá hugsað verður um, at vit byggja okkara fólkaræði á amerikonsku demokratisku skipanina. Tí mugu vit eisini seta allar góðar kreftir inn til at hjálpa teimum í USA, sum royna at fáa deyðarevsingina avtikna. Okkurt bendir á, at statir í USA eru við at endurskoða støðuna til deyðarevsing, men tíanverri hevur landið ein forseta, sum er ein størstu forsprákarum fyri somu deyðarevsing. Vit kunnu so bert vóna, at valið av nýggjum limum til Hægastarætt fer at bera í sær, at man eisini á hesum stað fer at endurskoða sína støðu til deyðarevsing. Tí skal tað vera okkara ynski og áheitan á allar føroyingar um at geva sítt íkast til stríðið móti deyðarevsingini í USA.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Veitingin úr Danmark verður 400 mió. krónur minni á hvørjum ári framyvir.

**Edmund Joensen**



Landsstýrið hevur sagt farvæl við 400 mió. krónur um árið, hvørt eitt ár fram yvir í allar ævir. Niðurskurðurin í blokkinum og yvirtøkur tilsamans svara til umleið hesa upphædd.

Upphæddin sum landsstýrið hevur slept svarar til, at eitt Suðuroyðarskip við havnaðannleggum varð keypt á hvørjum árið og goldið kontant. Ella vit kunnu samanbera tað við ein undirsjóðartunnil til Norðoyggjar, ella eina flogvallaútbygging í Vágum, leinging og nýmótansgert á hvørjum ári og goldin kontant.

Samstundis vil landsstýrið hava, at danska stjórnin kemur við øðrum donskum pengum til somu flogvallaútbygging, áðrenn yvirtøkan verður framd. - Skil tað hvør sum kann.

Stóra landskassaskuldin er ikki niðurgoldin við einum oyra eyka útum tað bundna. Sjálvt lánsbrøvini hjá landskassanum, sum fullu til gjaldingar seinast eru endurfíggjaði.

**Landstýrið og fíggjarlógin**

Um sama mundi samtykkir løgtingsmeirlutin hjá samgonguni eina fíggjarlóg fyri næðsta ár, sum aftaná avdrøg kemur at hava eitt dundrandi hall.

Útreiðslurnar eru undirmettar, og summar eru als ikki tiknar við, (eitt nú yvirtøkan av fólkakirkjuni).

Eykafíggjarlógir higartil í ár hava kostað góðar 207 mió. krónur. Fer metingin hjá landstýrinum at halda líka illa næsta ár sum í ár, og líka illa sum undanfarin ár, (alt talar fyri hesum), so verður tað eitt stórt og álvarsligt upptak, ein komandi samgonga skal í holt við, beinan vegin eftir valið.

Sambært landstýrinum og loysingarmonnum í løgtinginum so eru hesar 400 mió. krónurnar minni um árið í frumintøkum bara byrjanin.

Í øðrum framkomnum londum hevði ein slík politisk skaðagerð uttan iva kostað eitt uppskot um misálit í tinginum á hægsta leiðarin í landinum.

Sambandsflokkurin hevur sagt kortanei til allan ørvitisskapin hjá landsstýrinum. Okkara ætlan var harafturímóti á øllum økjum at styrkja (konsilidera) føroyska samfelagið meðan løgir eru.

# Jólatónar í Ribarhúsi

*Fuglafjørður*



Týskvøldið 18. desember fara tveir fuglfirðingar at syrgja fyri jólatónum í Gallarí Ribarhúsi í Fuglafirði.

Eyðun Larsen fer at spæla ljómborð og Johan Hentze horn. Teir fara at spæla ymiskan tónleik; einamest jólatónleik.

Teir fara at spæla týskvøldið frá klokkan 19.00.

# Læknafelagið nýggja nevnd

Læknafelag Føroya hevði leygardagin aðalfund, og her varð nýggj nevnd vald fyri felagið.

Hans Petur Nielsen var afturvaldur sum formaður, og afturat honum sita hesi í nevndini: Odmar Færø, yvirlækni, Hans Jákup Simonsen, yvirlækni, Kári Rasmussen, kommunulækni, Annika Olsen, kommunulækni, Jens Andreassen, deildarlækni, og Elinborg Mortensen, hjælparlækni.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Fólkatingsvalið - serliga við atliti at Klaksvík

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*



Sambandsflokkurin takkar øllum sínum veljarum fyri, at hann gjørdist størsti flokkur - og harvið sigursharrin av fólkatingsvalinum.

**Valið í Klaksvík:**
Nú J. við Keldu er farin at viðgera gleðiliga valið í Vágum, so kann ein ikki annað enn hyggja eftir hansara eygna valdømi.

Sambandsflokkurin gjørdi eisini eitt gott val í Norðoyggjum. Um talan hevði verið um løgtingsval, so hevði Sambandsflokkurin fingið ein mann/kvinnu valdan. Hetta úrslit er at fegnast um, men tað kundi verið betri. Sambandsflokkurin átti við sínum politikki at kunna ivaleyst fingið 2 fólk vald í Norðoyggjum. Tí okkara politikkurin, hevur nakað at bjóða veljaranum, ið er annað enn tóm orð, ið er eyðkenni fyri dagsins loysingarpolitik.

Serliga í hesum døgum kemur so greidliga fram, hvat serliga Norðoyingar kunnu vænta sær, um loysingarleisturin hjá hesi samgongu verður fylgdur. Hvat fer at henda, um gingið verður í teirri rás, ið Annfinn Kallsberg, Jógvan við Keldu, Heini O. Heinesen hava slóða.

**Paralellur: Vágoyggin:**
Seinast í 80 unum var tekningin klár. Til tunnilin undir Vestmannasund. Eitt skot varð sprongt áðrenn valið. Beint eftir valið kom fram, at ongin peningur var til taks, og arbeiðið varð steðgað. Øll kenna síðan søguna. Loysingarpolitikkur og vanstýring høvdu rent Føroyar á húsagang. Loysingarflokkarnir royna at geva ríkisfelagsskapinum skyldina, heldur enn at taka í egnan barm. Nú gongur so aftur við strúkandi ferð í ríkisfelagsskapinum, og tunnilin verður skotin ígjøgnum ein av fyrstu døgunum.

**Vandi: Loysingin lúrir - við tekningum, men ongum peningi:**
Men ein stórur vandi lúrir. Fyri 10 -15 árum síðani sat Tjóðveldi á Landskassanum, ið var við at spreingast av peningi, segðist. Nú situr so aftur Tjóðveldi á Landskassanum, ið aftur er við at spreingast av peningi - sigst. Tá aðrir koma til , hava teir nokk arbeitt uppá sama hátt sum seinast, og tann nógvi peningurin vórðu tóm orð, sum so mangt annað.

**Leirvíkstunnilin:**
Men nú sær ein onnur tekning dagsins ljós. Ein tekning av eini alneyðugari tunnil um Leirvíksfjørð. Hendan kostar ikki nógv at tekna, men at gera.

Sambandsflokkurin vil, at hendan tunnil skal gerast nú

Loysingarflokkarnir hava við at kvetta Ríkisveitingina við 400 milliónum krónum skaða Føroyar almikið. Verður nú penigur fyri Leirvíkstunnilin?.Verður peningur til at reka Klaksvíkar Sjúkrahús? Verður peningur til alt tað loysingarfólk egna við í løtuni, uttan at vísa okkum eina nágreiniliga hvar peningurin kemur frá? Í Vágum merktu vit á egnum kroppi, at eitt er tekning annað er veruleikin, tá ongin króna er at gera projektið.

Spyr Annfinn Kallsberg, Jógvan við Keldu, Eyðun Eltør, Karstin Hansen og Heina O Heinesen um konsekvensútgreiningar av at ríkisveitingin verður skerd.. Tað er uppá tíðina, at serliga teirra egnu veljarar spyrja, um peningur er til annað enn tekningina. Vit í løgtinginum hava ikki sæð hesar. Og lat teir ikki sleppa undan at svara! Og renna undan ábyrgd - tí tað duga teir væl.

Tí komandi ár er vandi fyri einum halli á fíggjarlógini uppá 70 milliónir krónur. Tá er ikki nógv at byggja fyri, men tvørturímóti skal skerjast - aftur orsaka av politiskum loysingar kleyvaraskapi.

**Fast Samband og Sambandsflokkurin hoyra saman:**
Tí er okkara greiði boðskapur til Norðoyingar: Loysingin hevur kanska ráð til tekningina.

Vit hava ráð til tekningina og at gera tunnilin. Um loyst verður, so er vandi fyri, at Klaksvíkar Sjúkrahús verður niðurlagt og at ongin tunnil verður gjørd.. Tí loysingin hevur ein sera álvarsliga trupulleika. Teir hava ongan pening. So einkult er tað. Ein tekning kostar ikki nógv. At byggja kostar ofta almikið og er neyðugt um framburður skal verða.

Jú - minst tveir mans til Sambandsflokkin í Norðoyggjum til næsta val. Tað er tað besta fyri Norðoyggjarnar.

Góð jól.

# Vátur jóladansur



*Høllin á Kambsdali*

All That Rain fer at spæla til jóladans á Kambsdali leygarkvøldið. Tað er Gøtu Ítróttarfelag, sum skipar fyri hesum tiltaki.

Hetta er tíðin, tá nógvir útisetar leita heimaftur til Føroya, og tí er slíkt dansitiltak eisini ætlað teimum, sum koma heim hesa ársins tíð.

All That Rain hevur seinastu vikurnar spælt aftur til dans, eftir at teir lógu stillir í nakrar mánaðir, tá Jens Marni Hansen var farin úr bólkinum. Nú er tað vágamaðurin Hans Ravnsfjall, sum tekur sær av gittarspæli og sangi, og bólkurin hevur vant sera nógv við nýggju manningini.

Dansurin verður í ítróttarhøllini á Kambsdali leygarkvøldið.

-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

| | |
|---|---|
| **TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL** Skrás.: 07-07-99 Km.: 43.000 Prísur: 154.600,- Garanti** | **TOYOTA YARIS 1,3 LUNA** Skrás.: 02-06-00 Km.: 25.000 Prísur: 128.600,- Garanti** |
| **TOYOTA CARINA E 2,0 DIESEL** Skrás.: 25-07-96 Km.: 74.000 Prísur: 134.600,- Garanti* | **FIAT MAREA 2,0 STATION** Skrás.: 15-10-98 Km.: 38.000 Prísur: 145.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CARINA E 1,6 XLI** Skrás.: 13-06-95 Km.: 155.000 Prísur: 84.600,- Garanti* | **HYUNDAI ACCENT 1,3** Skrás.: 16-07-97 Km.: 75.000 Prísur: 65.600,- |
| **TOYOTA CARINA 2,0 GLI** Skrás.: 02-08-89 Km.: 176.600 Prísur: 45.600,- Sýnaður 11-00 | **HONDA CIVIC 1,4 SEDAN** Skrás.: 20-12-95 Km.: 120.000 Prísur: 89.600,- Garanti* |
| **TOYOTA COROLLA 1,9 DIESEL** Skrás.: 08-03-01 Km.: 13.000 Prísur: 158.600,- Garanti** | **MAZDA 323 H/B DIESEL** Skrás.: 22-07-99 Km.: 55.000 Prísur: 115.600,- Garanti* |
| **TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL** Skrás.: 06-05-99 Km.: 35.000 Prísur: 136.600,- Garanti** | **OPEL TIGRA 1,6** Skrás.: 18-10-96 Km.: 84.000 Prísur: 79.600,- Sýnaður 10-00 |
| **TOYOTA COROLLA 1,6 SEDAN** Skrás.: 02-08-99 Km.: 31.000 Prísur: 124.600,- Garanti** | **SUZUKI SWIFT 1,3** Skrás.: 02-05-90 Prísur: 25.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,6 L/B** Skrás.: 24-06-99 Km.: 31.000 Prísur: 115.600,- Garanti** | **CITROEN SAXO 1,1** Skrás.: 24-07-95 Km.: 67.000 Prísur: 38.600,- Sýnaður 11-00 |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA L/B** Skrás.: 30-09-98 Km.: 52.000 Prísur: 98.600,- Garanti** | **DAEWOO NUBIRA 2,0** Skrás.: 12-05-99 Km.: 33.000 Prísur: 89.600,- Garanti* |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 LUNA H/B** Skrás.: 18-11-97 Km.: 55.000 Prísur: 89.600,- Garanti* | **MERCEDES BENZ 250 DIESEL** Skrás.: 27-08-85 Km.: 257.000 Prísur: 59.600,- Sýnaður 03-01 |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 XLI** Skrás.: 17-01-95 Km.: 175.000 Prísur: 65.600,- | **FORD MONDEO 1,8** Skrás.: 01-01-95 Km.: 101.000 Prísur: 72.600,- |

** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.
* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN

VØRUVOGNAR

| | |
|---|---|
| **TOYOTA LANDCRUISER 4,2 VAN** Skrás.: 21-11-96 Km.: 135.000 Prísur: 195.600,- | **MAZDA E 2200 4X4 VØRUVOGNUR** Skrás.: 14-10-96 Km.: 69.000 Prísur: 126.600,- Sýnaður 11-00 |
| **NISSAN PATROL 2,9 TD VAN** Skrás.: 16-06-98 Km.: 60.000 Prísur: 234.600,- | **MAZDA B-2500 PICK-UP** Skrás.: 01-10-00 Prísur: 132.600,- |
| **NISSAN KING CAB** Skrás.: 19-01-96 Km.: 152.000 Prísur: 105.600,- Sýnaður 12-00 | **NISSAN ECO-T 6T.V/VIPPULAST & KRANA** Skrás.: 23-06-97 Km.: 97.000 Prísur: 135.600,- Sýnaður 09-01 |

STØKK INN Á GÓLVIÐ
REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820